FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Stýrisfundur 22. november 2016**

---

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Týsdagur 22. november, klokkan 9-15 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Marita Rasmussen, Tove Bull, Gestur Hovgaard, Sára Joensen, Kolbrún í Haraldsstovu, stýrislimir, Sigurð í Jákupsstovu, rektari, og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri. Juanna Joensen luttók umvegis Skype frá kl. 13 |

---

Herálvur bjóðaði vælkomin. Setanarskeiðið hjá stýrinum gongur út 31. desember 2016, hetta er tískil seinasti fundurin hjá sitandi stýri. Eitt nýtt stýri tekur við eftir ársskiftið.

**Skrá:**

1. **Góðkenning av fundarfrágreiðing frá stýrisfundi 14. september 2016**

Fundarfrágreiðingin góðkend.

2. **Góðkenning av fundarskrá**

Fundarskráin góðkend. Harumframt varð punktið "sjálvseftirmeting hjá stýrinum" lagt aftrat skránni.

3. **Fíggjarstøðan**

Setrið hevur havt trupult við at fylgja við leysalæraraútreiðslum, hetta er serliga galdandi fyri ávísar deildir. Framstig eru hend á økinum, men Setrið má stramma munandi meira upp, soleiðis at neyvari fíggjarætlan kann leggjast fyri árið.

4. **Fíggjarætlan 2017**

Setrið verður undirfíggjað sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2017. Um verandi virksemi skal halda fram, er neyðugt at fáa 4 mió.kr. fyri at fáa ein tryggan rakstur. Um peningurin ikki verður settur av, verður neyðugt at spara.

| | | Fyrisiting | | | Hugvísindi | | | Heilsuvísindi | | | Játtan/budget 2017 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | R 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 | R 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 | R 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 | Æ 2017 | J 2017 | Avlop/ Hall |
| 11 | Lønir v.m. | 9.466 | 9.646 | 9.559 | 36.761 | 39.729 | 44.075 | 19.580 | 21.937 | 25.591 | 79.225 | 74.866 | -4.359 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 4.602 | 4.500 | 4.908 | 4.665 | 4.100 | 4.336 | 1.926 | 1.900 | 1.926 | 11.170 | 10.500 | -670 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 321 | 200 | 473 | 269 | 200 | 371 | 74 | 150 | 74 | 918 | 1.100 | 182 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.441 | 2.300 | 2.300 | 125 | 100 | 155 | 336 | 300 | 336 | 2.791 | 2.600 | -191 |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | | | 0 | 0 | | 0 | | | 0 | | 0 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -281 | -200 | -200 | -226 | -500 | -500 | -47 | -300 | -100 | -800 | -1.000 | -200 |
| 29 | Ymsar rakstrarinntøkur | 0 | | | 0 | | | | | | 0 | | 0 |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | 80 | 100 | 100 | 0 | | | 0 | | | 100 | 100 | 0 |
| 54 | Stuðul til annað virksemi | 50 | | | 0 | | | | | | 0 | | 0 |
| 57 | Rentuútreiðslur o.a. | 0 | | | 0 | | | 0 | | | 0 | | 0 |
| 61 | Skattur og avgjøld | 0 | | | 0 | | | | | | 0 | | 0 |
| 62 | Kravd gjøld, bøtur o.a. | 0 | | | 0 | | | | | | 0 | | 0 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | 0 | | | 0 | | | | | | 0 | | 0 |
| 65 | Flytingarinntøkur úr útlandinum | 0 | | | -68 | | | | | | 0 | | 0 |
| 71 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 22 | | | 38 | | | | | | 0 | | 0 |
| 76 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -50 | | | -2.415 | -2.200 | -2.200 | | | | -2.200 | -2.200 | 0 |
| 77 | Flyting frá kommununum til landið | 0 | | | -1.712 | -1.500 | -1.500 | | | | -1.500 | -1.500 | 0 |
| | TF - Holding | 0 | | | | -1.000 | -1.700 | | | | -1.700 | | 1.700 |
| | **Tilsamans** | **16.651** | **16.546** | **17.140** | **37.437** | **38.929** | **43.038** | **21.869** | **23.987** | **27.827** | **88.004** | **84.466** | **-3.538** |

| | Fyrisiting | | | Hugvísindi | | | Heilsuvísindi | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lønir** | R 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 | R 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 | R 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 |
| Fastar lønir | 9.416 | 9.646 | 9.559 | 33.467 | 36.372 | 39.736 | 17.980 | 20.840 | 23.024 |
| Leysalæraralønir | 50 | | | 2.669 | 2.167 | 2.756 | 1.600 | 694 | 1.919 |
| Starvslæra | | | | 625 | 840 | 840 | | | |
| Funktiónsviðbót | | | | | | | | 403 | 370 |
| Bed-uppgávur | | | | | 350 | 370 | | | |
| Adjungeraði | | | | | | 134 | | | 277 |
| Serstakafrívikan (6 frívikan) | | | | | | 240 | | | |
| **Samanlagt** | **9.466** | **9.646** | **9.559** | **36.761** | **39.729** | **44.075** | **19.580** | **21.937** | **25.591** |
| **Broyting í lønarútr.** | **272** | **180** | **-87** | **1.342** | **2.968** | **4.346** | **1.270** | **2.357** | **3.654** |

*Fyrivarni verður tikið fyri leysalærarútreiðslunum fyri 2016, tí neyv tøl eru ikki fingið til vega

Stýrisformaðurin fer á fund við aðalstjóran í Mentamálaráðnum í morgin, har millum annað fíggjarætlanin fyri 2017 verður umrødd. Rektarin og fíggjarleiðarin fara í næstum at biðja um fund við MMR fyri at greiða frá støðuni.

## 5. Eftirmeting av bygnaðinum – tilmæli

Rektarin legði fram.
Tilmælið frá Input er úrslitið av eini inkluderandi tilgongd, har øll starvsfólk við føstum tilknýti til Fróðskaparsetrið, saman við umboðum fyri tey lesandi, hava luttikið. Hugbankin hevur gjørt eitt tilmæli, sum verður sent til hoyringar hjá starvsfólkum og lesandi

Hugbankin, við 20 umboðum, hittust í tveimum umførum fyri og eftir summarfrítíðina. Hugbankin hevur bygt sítt arbeiði á tilfarið, sum varð framleitt í verkstovunum.

Semja er um, at staðbundin leiðsla hevur fremstu raðfesting.

Íverkskipanin verður skipað í 3 stig.

Stig 1:

- Seta staðbundna leiðslu á tær 5 deildirnar
- Viðurskiftini viðvíkjandi tilvísing hjá skrivstovufólkum skulu lýsast betri

Stig 2:
- Felags ECTS (Bologna) og lestrarskipan
- Harmonisera allar fyriskipanir, mannagongdir og reglur
- Felags valfak
- Gera eitt felags skeiðskatalog, økja tilvitanina um skeið upp á tvørs av deildum – og lýsa kombinatiónsmøguleikarnar
- Menna eitt konsept við felags pulju at gera skeið (fak), skal vera relevant fyri minst tvær deildir
- Gera eitt dagført yvirlit yvir allar granskingarætlanir á Setrinum
- Skipa ein arbeiðsnorm, sum er gjøgnumskygdur
- Seta útbúgvingarleiðaraforum í verk
- Styrkja fyrisitingina til at útføra tiltøkini
- Seta eina HR-funktión á stovn
- Seta eina granskingarstuðulsfunktión á stovn

Stig 3:
- Arbeiða við framtíðarbygnaði av Setrinum
- Menna fakultetið
- Menna lestrarumhvørvi og lestrartænastur

Neyvar tíðarætlanir skulu gerast fyri hvørt stig sær.

Rektarin legði tilmælið um staðbundna leiðslu og nýggjan leiðslubygnað fram:
Dekanar verða settir fyri hvørja deild, t.v.s. at tað verða fimm dekanar, sum arbeiða sum leiðarar á síni deild umframt at teir arbeiða við gransking, útbúgving og fyrisiting. Dekanur skal vera granskari (lektari ella ájavnt). Dekanar á somu megindeild hava felags ábyrgd av menning av megindeildini, og eru javnsettir í leiðsluni og vísa til rektaran. Upplýst varð, at dekanarnir fáa fulla fíggjarliga ábyrgd fyri deildunum.

Lýst verður innanhýsis eftir 5 dekanum í desember. Dekanstørvini eru 3 ára størv – men kunnu verða niðurløgd, um deildir verða lagdar saman ella niðurlagdar. Í sama 3 ára tíðarskeiði skulu megindeildirnar (fakultetini) skipast (+endamál og strategi) og dekanstørvini setast av nýggjum.

Stýrið vil í hvussu er fyribils varðveita megindeildinar, men samstundis ganga ynskinum um staðbundna leiðslu á møti. Stýrið tók undir við tilmælinum.

### 6. Lýsing av fyrisitingarstjóra- og dekanstørvum

Málið umrøtt.

### 7. Tilnevning av 2 limum og 2 varalimum í nevndina fyri Landsbanka Føroya

Fíggjarmálaráðið hevur heitt á Setrið um at tilnevna limir í nevndina fyri Landsbanka Føroya. Sambært løgtingslógini eigur Fróðskaparsetrið at tilnevna 2 limir og 2 varalimir til landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Stýrisformaðurin ger uppskot til limir og varalimir og sendir tað til ummælis hjá stýrislimunum í vikuni.

8. **Kunningarmál**
   a. **Val av stýrislimum umboðandi starvsfólk og lesandi**

Skeiðið hjá sitandi stýrið gongur sum áður nevnt út 31.12.2016. Mentamálaráðið hevur í hesum sambandi heitt á Fróðskaparsetrið um at senda Mentamálaráðnum tilmæli um limir og varalimir til komandi skeið hjá stýrinum, sum er 1.1.2016-31.12.2020.

Skipað verður fyri vali av starvsfólkaumboðum mikudagin 23. november. Harafturat hevur verið møguligt at greiða brævatkvøðu 14.-18. november. Fimm starvsfólk hava valt at stilla upp, tey eru:

- Hans Harryson
- Vár í Ólavsstovu
- Sára Joensen
- Svein-Ole Mikalsen
- Gestur Hovgaard

Valið av limi og varalimi av lesandi fer fram elektroniskt á eini valskipan, sum eitur ElectionBuddy. Atgongd er til valskipanina í tíðarskeiðnum frá 21. november kl. 10.00 til 23. november kl. 24.00.
Fimm valevni hava bjóðað seg fram, tey eru:

- Bárður Clementsen, 1. árslesandi, B.A. Politikkur og umsiting, Søgu- og samfelagsdeildin
- Tór Marni Weihe, 2. árslesandi, B.A. Politikkur og umsiting, Søgu- og samfelagsdeildin
- Gunnar Knudsen, 3. árslesandi, B.Sc. í KT-verkfrøði, Náttúrvísindadeildin
- Emil Hermansen, 4. árslesandi, M.A. í Løgfrøði, Søgu- og samfelagsdeildin
- Silja Aldudóttir, 4. árslesandi, M.A. í føroyskum, Føroyamálsdeildin

   b. **Hølisviðurskifti**

Mentamálaráðið hevur heitt á Setrið um saman við LV gera eina ætlan fyri, hvussu Setrið ímyndar sær at flyta sítt virksemi inn í Sjóvinnuhúsið. Setrið er áhugað, men hevur samstundis boðað MMR frá, at hølini eru ov lítil til at hýsa øllum virkseminum. Ein arbeiðsbólkur, mannaður við dekanunum, fyrisitingarstjóra og umboði fyri lesandi, er byrjaður at arbeiða málinum.

9. **Ymiskt**

a. **Sjálvseftirmeting hjá stýrinum**

Stýrislimur vísti á, at sambært § 24 í reglugerðini fyri virksemið fyri stýrið skal stýrið eina ferð um árið gera eina munnliga sjálvseftirmeting av avgerðum og úrslitum undir leiðslu av formanninum. Høvuðspunktini frá sjálvseftirmetingini verða endurgivin í fundarfrágreiðingini.

Eisini varð mint á, at nevnda “Reglugerð fyri virksemi” ásetir, at hon eigur at verða gjøgnumgingin árliga, og tað er ikki gjørt síðani 2011.

Tað er umráðandi at eitt komandi stýri verður sett væl inn í reglugerðina. Reglugerðin eigur at endurskoðast á fyrst komandi stýrisfundi.

**b. Heimasíðan**

Spurt varð inn til arbeiðið við heimasíðu og intraneti. Ætlanin er at sjóseta bæði fyrst í komandi ári.